# Take Off á fløgu



*Hans Petur í Brekkunum og bólkurin Take Off koma við fløgu fyrsta dagin*

**Spennandi bólkurin Take Off er til reiðar við nýggjari fløgu, sum nevnist Blandað Bomm**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*

Spennandi nýggi føroyski bólkurin Take Off, sum heldur til í Danmark, er á trappuni við fløgu. Fløgan hevur heitið Blandað Bomm og verður á fløguhillunum ein av komandi døgunum.

Hans Petur í Brekkunum er ein av oddafiskunum í bólkinum og hann er vælkendur sum bæði dugnaligur saxofonleikari og sangari.

Hans Petur sigur, at fløgan er á tremur við góðum popp, rock og funk tónleiki, ið óivað kemur at seta dám tónalandslagið í summar, so føroysk oyru hava nakað at gleða seg til.

# Guðrun fingið heimasíðu

**Guðrun Sólja Jacobsen hevur fingið heimasíðu, har til ber at fylgja við henni og fáa ymiskt at vita**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*

Nú ber til at vitja Guðrun á hennara egnu heimasíðu. Guðrun er fyri tað mesta á ferð og í upptøkuhølum í Danmark, menn hetta er nú eingin forðing fyri at fylgja við henni ella at koma í samband við hana.

Managari hennara hevur syrgt fyri, at hon nú hevur egna heimasíðu, har tað fæst at vita um hana, um Føroyar og um hvat er á skránni hjá henni framyvir, tí konsertætlan sæst á síðuni langt fram í tíðina. Síðan eitur www.gudrun-jacobsen.com

Eisini ein fjepparasíða hevur sæð dagsins ljós og hon eitur www.gudrun-solja.dk



# Ár teirra brekaðu setir dám á jóansøkuna

**2003 er ár teirra brekaðu og hetta merkir eisini jóansøkuna. Eyðun Joensen, sálarfrøðingur heldur fyrilestur í kvøld í Trongisvági og M'as Blues Band spælir eisini á jóansøku**

BREKAÐ
*Dagfinn Olsen*

Jóansøkan er byrjað og ár teirra brekaðu setir eisini dám á jóansøkuna í ár. Í kvøld heldur Eyðun Joensen, sálarfrøðingur, fyrlestur í skúlanum í Trongisvági. Heitið á fyrilestrinum er "Hugburður til fólk, ið bera brek". Pauli Einarsson, býráðslimur, býður vælkomin.

Eisini M'as Blues Band fer á pall á jóansøku. Í skúlanum í Trongisvági er eisini framsýning við lutum, sum fólk á Varda verkstaðnum á Bakka í Vági hava evnað til. Eisini er tilfar frá Meginfelag Teirra Brekaðu.

## Ár teirra brekaðu

Almannaráðið minnir í tíðindaskrivi á, at 2003 er Ár teirra brekaðu.

Føroyar eru eitt av monggum europeiskum londum, sum hava valt at seta viðurskifti teirra brekaðu á dagsskránna í ár.

"Vit eiga at arbeiða fram ímóti einum samfelagi, sum er fyri øll, og ikki bert fyri tey, sum hava fullan førleika. Tað er tíverri langt eftir á mál, men 2003 er eitt stig tann rætta vegin".

Páll á Reynatúgvu hevur avgjørt at seta ein stýrisbólk, sum vegna landsstýrismannin skal standa fyri tí almenna partinum av Ári teirra brekaðu. Í stýrisbólkinum eru umboð fyri Landsverkfrøðingin, Vinnuhúsið, Føroya arbeiðarafelag, Meginfelag teirra brekaðu, Ráðið fyri brekað, Mentamálaráðið og Almannamálaráðið.

Landsstýrismaðurin í almannamálum hevur sett 150.000,- kr. á fíggjarlógina til Ár teirra brekaðu. Harumframt er ætlanin at oyramerkja aðrar 150.000,- kr. í studningi til viðkomandi tiltøk, sum verða fyriskipað í 2003.

Feløg kunnu søkja um fíggjarligan stuðul, tá tey skulu skipa fyri tiltøkum í Ári teirra brekaðu. Stýrisbólkurin viðger innkomnar umsóknir og ger so tilmæli til landsstýrismannin um, hvussu stuðulin skal latast. Føroya landsstýri arbeiðir sambært ST fyrimyndarreglunum um at útvega javnlíkar møguleikar fyri brekað fólk.

"Í Føroyum eru nógvir bygningar, bæði almennir og privatir, sum við sínum trongu durum ella brøttu trappum kveistra tey rørslutarnaðu burtur. Tíbetur tykjast arkitektar og byggifrøðingar í dag at hava tey rørslutarnaðu í huga. So broytingin til tað betra er í gongd", heldur Páll á Reynatúgvu.

Eisini ynskir landsstýrismaðurin at seta kikaran á ta atgongd, fólk við avmarkaðum førleika hava til arbeiðsmarknaðin.

Við Ári teirra brekaðu í huganum hevur landsstýrismaðurin uppraðfest MBF við 500.000 krónum á fíggjarlógini fyri 2003. Hendan uppraðfesting fer óivað at síggjast aftur í arbeiðinum fyri brekað.

Arbeiðsbólkar, stýrisbólkar, pallborðsfundir. Orð vit kenna út og inn. Tað liggur nær at spyrja, um nakað fer at koma burturúr hesum árinum, sum Føroya landsstýri hevur tikið stig til.

Svarið má vera ja. Tílík tiltøk eru við at flyta mørk og at broyta almenna hugburðin, so framtíðar forðingar fyri tey, sum ikki hava fullan førleika, verða eitt sindur léttari at vinna á.

Í 2003 skulu vit seta viðurskifti á dagsskránna, sum fyri fólk flest eru ein sjálvfylgja, men sum tarna summum í at fáa fulla atgongd til samfelagið. Við at geva hesum viðurskiftum gætur, økja vit um ta neyðugu tilvitanina, bæði hvat viðvíkur trupulleikum og framtíðar loysnum. Merkisár sum Ár teirra brekaðu 2003 eru neyðug fyri at halda kósina móti einum landi, sum er fyri øll. Vónandi verða tílík merkisár einaferð óneyðug, sigur Almannaráiðið m.a. í tíðindaskrivi.

# Fløga kemur í dag við Nordic End Quintet

**Nordic End Quintet er við Edvardi Nyholm Debess á odda og seinnu árini hevur hann megnað at spæla seg inn í føroyska hugaheimin, so eingin er í iva um hvat tað snýr seg um. Saman við norðurlendskum tónleikarum hevur hann nú spælt inn føroyskar sangir og kvæði. Malan Thomsen syngur og nýggja felagið Landing Duck Records gevur út**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*

Í dag, 27.juni, kemur forvitnislig fløga á marknaðin. Nakrir av fremstu tónleikarunum innan jazz í Føroyum, Finnlandi og Danmark eru við. Maðurin handan fløguætlanina er Edvard Nyholm Debess, sum fyrr hevur havt væleydnað samstarv við norðurlendskar tónleikarar, hann gav m.a. í 2000 út fløguna Debazz saman við donskum tónleikarum.

Nú kemur fløgan við Nordic End Quintet og hon hevur heitið LØG. Umframt Edvard N. Debess og Maluna Thomsen, er manningin av ovastu rók innan jazz í Danmark og Finnlandi. Tann kendi Alex Riel, Danmark, leikar á trummur og á saxofon og klaver eru Eero Koivistoinen og Seppo Kantonen, sum í Finnlandi er navnframir tónleikarar.

Talan er um vælkend kvæði og sangir úr Føroyum.

Edvard N. Debess og Seppo Kantonen hava lagt tónleikin tilrættis og gevur hetta sangum og kvæðum heilt nýggjan dám. Teir hava lagt seg eftir at tilrættisleggja uttanum sangin, so lagið í størstan mun verður varðveitt.

Nevnast kunnu løg sum Tú sangst eitt so vakurt.., Ein Firvaldur í góðum lag, Flóvin Bænadiktsson, Brúðarvísan og Aldan.

Ein forvitnislig, vælspæld og melodiøs fløga, sum brýtur upp úr nýggjum, siga útgevararnir.

Og útgevari er nýtt felag, ið nevnist Landing Duck Records. Fløgan kemur út í dag og er fyrsta fløgan á nýggja forlagnum. Meira fæst at vita við at vitja alnetið á www.landing-duck.com og www.debazz.com



# OYGGJALEIKIR 2003



*115 føroysk ítróttarfólk fara at kappast á Guernsey komandi vikuna. Føroyingar eru við í 11 av teimum 15 ítróttargreinunum, sum tað verður kappast í*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Málið er gull og heiður

**115 ítróttarfólk fara næstu vikuna at umboða føroysku tjóðina á 10. oyggjaleikunum, sum verða hildnir á Guernsey. Málið er gull og heiður, men stríðið er hart, og alt skal eydnast til røttu tíðina, skulu heiðursmerki spyrjast burturúr**

OYGGJALEIKIR
*Eyðun Klakstein*

Klokkan hálvum seks hóskvøldið lætti tað fyrsta føroyska flogfarið sær úr Vágum fult lastað við føroyskum ítróttarfólkum, sum skulu til Oyggjaleikirnar á Guernsey.

Sunnudagin byrja kappingarnar á teimum 10. oyggjaleikunum, og fram til fríggjadagin í næstu viku verður kappast í 15 ymiskum ítróttargreinum.

Føroyingar hava umboð við í 11 av hesum ítróttargreinum, og samanlagt fara 115 føroyingar at vera við í kappingunum á Guernsey.

Harafturat koma venjarar, leiðarar, hjálparfólk og áskoðarar, so at samanlagt fara 267 føroyingar til Oyggjaleikirnar hesaferð.

## 23 oyggjar eru við

Føroyingar fara at hava umboð við í ítróttargreinunum fótbóltur, flogbóltur, badminton, súkkling, triatlon, svimjing, fimleikur, borðtennis, tennis, frælsur ítróttur og bogaskjóting.

Ítróttargreinarnar, sum vit ikki fara at kappast í, eru kurvabóltur, golf, sigling og skjóting.

23 oyggjar eru við á Oyggjaleikunum hesaferð, og á Guernsey rokna tey við omanfyri 2500 útlendskum gestum – ítróttarfólki, leiðarum, venjarum, dómarum og áskoðarum – í sambandi við leikirnar.

## Øll á sama hotelli

Føroysku ítróttarfólkini fara øll at búgva á sama hotelli á Guernsey. Á hesum hotelli koma bara føroyingar at búgva, og sambært forsetanum í ÍSF er hetta ein góð loysn.

– Tað léttir nógv um samskipan og fyrireiking á sjálvum Oyggjaleikunum, at øll ítróttarfólkini búgva á sama hotelli. Tað ger tað nakað léttari at boða frá broytingum og at skipa fyri, tí tú sleppir undan at koyra runt til ymisk støð fyri at fáa fatur á ítróttarfólki og leiðarum, sigur Heðin Mortensen.

Umframt hotellið við føroyskum ítróttarfólki, búgva føroyingar á tveimum øðrum hotellum á Guernsey.

## Gingið væl

Føroyska Oyggjaleikanevndin hevur í langa tíð arbeitt við fyrireikingunum til Oyggjaleikirnar, og har lata tey væl at arbeiðnum.

– Tað hevur gingið væl við fyrireikingunum, og alt líkist sær sjálvum frá undanfarnum árum, sigur Sofus Johannesen, sum er ein av teimum trimum í Oyggjaleikanevndini. Petur Elias Petersen er formaður, og Katrin Joensen er eisini í nevndini.

– Talið á føroyskum luttakarum er nakað tað sama, sum tað var fyri tveimum árum síðani, og vit vóna, at alt fer at spæla væl av á Guernsey.

Seinast endaðu Føroyar sum nummar 5 í samanløgdu støðuni.

## Gott hugskot fótaði sær

Oyggjaleikirnir byrjaðu sum eitt hugskot á Isle of Man miðskeiðis í áttatiárunum. 1985 fingu tey hugskot at savna ítróttarfólk frá ymsum oyggjum til eina stevnu í sambandi við teirra Ítróttarár.

Nógvar oyggjar tóku undir við hugskotinum, og longu fyrsta árið vóru 15 oyggjar við og kappast var í sjey ítróttargreinum.

Fyrstu Oyggjaleikirnir eydnaðust so væl, at tað var gjørt av, at leikirnir skuldu haldast annaðhvørt ár framyvir.

Tað er felagsskapurin IGA, sum stendur fyri Oyggjaleikunum, og nú eru 23 oyggjar limir í hesum felagsskapi.

## Føroyar á Oyggjaleikum

| | Gull | Silvur | Bronsa | Plasering |
|---|---|---|---|---|
| Isle of Man 2001 | 15 | 12 | 13 | Nr. 5 |
| Gotland 1999 | 7 | 12 | 9 | Nr. 9 |
| Jersey 1997 | 5 | 10 | 22 | Nr. 8 |
| Gibraltar 1995 | 10 | 14 | 15 | Nr. 6 |
| Isle of Wight 1993 | 5 | 5 | 13 | Nr. 9 |
| Áland 1991 | 6 | 10 | 11 | Nr. 6 |
| Føroyar 1989 | 13 | 5 | 10 | Nr. 3 |
| Guernsey 1987 | 1 | 2 | 5 | Nr. 10 |
| Isle of Man 1985 | 0 | 2 | 1 | Nr. 10 |